SJÚKRAHÚS VERKIÐ

Sjúkrahúsverkið

# Talgild skipan til leiðreglur og HR

Útboð – juni 2024

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn

Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo

ls.fo

# Innihald

Innleiðing ........................................ 2
Lýsing ........................................ 2
Stødd ........................................ 2
Bygnaður ........................................ 3
Kravfesting ........................................ 3
Avtala og karmar ........................................ 3
Meta um tilboðini ........................................ 4
Tilgongdin frameftir ........................................ 5
Fyrivarni og alment innlit ........................................ 5



LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo

## Innleiðing

Sjúkrahúsverkið bjóðar út talgilda skipan til leiðreglur og HR. Útboðið verður gjørt sambært "Rundskriv nr. 9003 frá 1. juli 2019 um keyp av vørum og tænastum".

## Lýsing

Sjúkrahúsverkið skal seta í verk eina felags talgilda skipan til leiðreglur, so starvsfólk kenna leiðreglur og mannagongdir uttan mun til hvar í Sjúkrahúsverkinum tey starvast. Umframt at virka sum ein skipan til leiðreglur, skal skipanin vera við til at tryggja eina systematiska tilgongd til mynstran og førleikamenning. Sjúkrahúsverkið ynskir at fáa eina samlaða skipan til bæði økini.

*Leiðreglur*
Tørvur er á eini neyvari og brúkaravinarligari talgildari skipan til leiðreglur, sum skal vera við til at tryggja, at okkara starvsfólk kenna leiðreglur og mannagongdir, uttan mun til hvar ein starvast í Sjúkrahúsverkinum og uttan mun til tíð og stað. Skipanin skal tryggja dygdargóðar viðgerðir og røkt til eina og hvørja tíð.

*HR*
Tørvur er á eini talgildari HR-skipan, sum kann tryggja, at starvsfólk fáa bestu starvsbyrjan og harafturat at tryggja leypandi førleikamenning fyri øll starvsfólkini í Sjúkrahúsverkinum. Skipanin skal vera við til at tryggja framhald og gott yvirlit í allari starvstíðini hjá starvsfólkunum.

## Stødd


Áleið 1.800 brúkarar, deild yvir trý sjúkrahús.

## Bygnaður

Sjúkarhúsverkið er skipað við einum forstjóra, tveimum stjórum og fýra varastjórum.

Tilsamans hevur Sjúkrahúsverkið á leið 107 leiðarar á ymiskum leiðsluløgum.

- Ovasta leiðslan er skipað við sjey leiðarum.
- Depils- og stápsleiðslan er skipað í sjey ymiskar deplar á Landssjúkrahúsinum við tilsamans 12 depilsleiðarum og fýra stápsleiðarum.
- Tilsamans deilt yvir sjey deplar, fýra stápar og trý sjúkrahús, eru tað á leið 60 deildir í Sjúkrahúsverkinum.

Sjúkrahúsverkið er eitt fjølbroytt arbeiðspláss, har virðini stev, áræði og flog, eru okkara kumpass, sum vit brúka í okkara yrki í gerandisdegnum.

Í stuttum kann sigast um Sjúkrahúsverkið:

- Sjúkrahúsverkið er eitt politiskt stýrt verk og harvið bundið til givnar fíggjarligar karmar
- her starvast út við 1.200 starvsfólk innan 30 ymiskar fakbólkar
- Sjúkrahúsverkið veitir eina breiða viftu av viðgerðum, sjúkugreinanum og tænastum.

## Kravfesting

Vit ynskja eina talgilda skipan, sum:



- er liðugt ment og atkomulig bæði sum app og vevsíða
- tryggjar at kunning, leiðreglur og mannagongdir eru samlaðar eitt stað. Innihaldið skal vera lagað eftir teimum einkultu fakbólkunum. Tó skal ovasta leiðslan hava atgongd til alt innihaldið
- er brúkaravinarlig og inniheldur eina leitifunktión, sum ger tað møguligt skjótt og nemt at finna fram vegleiðingar og mannagongdir
- tryggjar eina systematiska tilgongd til mynstran og avmynstran, og førleikamenning. Hvør menningargongd skal kunna lagast eftir tí einkulta starvsfólkinum
- innihaldið skal kunna vera á minst tveimum málum - føroyskum og donskum
- kann verksetast á heysti 2024
- gevur møguleika fyri, at veitarin fylgir okkum í allari verksetanartilgongdini og hevur ábyrgd av størri skipanarligum trupulleikum, sum kunnu koma fyri
- skal kunna integrerast við Active Directory.

Øll tilboð skulu latast inn umvegis teldupostin hr@ls.fo. Somuleiðis viðvíkjandi spurningum og svarum. Spurningar og svar verða viðgjørd dulnevnd og verður svarað leypandi fram til tíðarfreistina.

## Avtala og karmar

Avtala verður gjørd við ein veitara av skipanini og tí, sum har til hoyrir.
Veitarin, ið vinnur útboðið, skal halda seg til tilboðið í tilgongdini, og seta vit tíðarfreistir í felag.

## Meta um tilboðini

Tað er umráðandi at tryggja góðskuna, tá ið mett verður um innkomnu tilboðini. Vektingin av innkomnu tilboðunum verður gjørd soleiðis:

50% kostnaður
50% góðska

Útrokningin fer fram á hendan hátt:

<u>Kostnaður:</u> Tilboðið við lægsta samlaða kostnaði fær 50 stig. Hini tilboðini fáa ásett eitt stigatal eftir hesum frymli:

$$\frac{\text{Lægsti tilboðsprísur}}{\text{Tilboðsprísur}} \cdot 50$$

<u>Góðska:</u> Her meinast við royndir og tilvísingar. Út frá eini samlaðari meting – út frá royndum og tilvísingum – verður eitt stigatal á einum skala frá 1-50 givið, har 50 er hægsta stigatal. Vit gera vart við, at hetta er okkara kvalitativa meting av góðsku.

*Dømi um útrokning*

<u>Góðska</u>

- Tilboð 1: Hesin veitarin skorar lægst, tí fyritøkan hevur fáar og ikki so viðkomandi royndir og tilvísingar, og veitarin hevur eina veika skipan. Hesin fær 12,5 stig.
- Tilboð 2: Hesin veitarin skorar miðal, tí royndir og tilvísingar eru á einum miðalgóðum støði. Hesin fær 25 stig.
- Tilboð 3: Hesin veitarin skorar hægst, tí fyritøkan hevur bestu og drúgvastu royndir og tilvísingar. Hesin fær 50 stig.

<u>Kostnaður</u>

- Tilboð 1: Tilboðið við lægsta kostnaðinum hjá veitaranum er 100.000 kr. Hetta gevur 50 stig.
- Tilboð 2: Næstlægsta tilboðið er 150.000 kr. Hetta gevur 100.000/150.000 x 50 = 33,33 stig.
- Tilboð 3: Triðlægsta tilboðið er 200.000 kr. Hetta gevur 100.000/200.000 x 50 = 25 stig.

<u>Samlað meting</u>

- Tilboð 1: Góðska 12,5 stig + kostnaður 50 stig = samlað meting á 62,5 stig.
- Tilboð 2: Góðska 25 stig + kostnaður 33,33 stig = samlað meting á 58,33 stig.
- Tilboð 3: Góðska 50 stig + kostnaður 25 stig = samlað meting á 75 stig.

Tað tilboðið, ið fær hægst stigatal vinnur útboðið. Í hesum dømi hevur tilboð 3 fingið hægst stigatal og tí vunnið útboðsrundina.



LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo

## Tilgongdin frameftir

Sjúkrahúsverkið bjóðar við hesum uppgávuna um eina felags talgilda skipan til leiðreglur og HR út við freist, sí niðanfyri.

Tá ein veitari er funnin verður talgilda skipanin endaliga ment í samstarvi millum Sjúkrahúsverkið og veitaran.

*Tíðarætlan*

- Vika 26: útboðið tøkt á útboðspallinum – 24. juni 2024
- Vika 26 og 27: veitarar spyrja um ivamál. Freist at spyrja er 3. juli 2024 kl. 12:00 og skulu spurningar sendast til hr@ls.fo. Spurningar verða leypandi svaraðir skrivliga og Sjúkrahúsverkið kunnar hinar veitararnar um spurningarnar og svar
- Vika 28: tann 10. juli 2024 kl. 12:00 er freist at lata tilboð inn
- Vika 28 og 29: viðgerð av tilboðunum
- Vika 29: Sjúkrahúsverkið tekur avgerð og fráboðan verður send veitarunum í seinasta lagi tann 19. juli 2024.

Úrslitið verður kunngjørt á Keypsportalinum og sent øllum tilboðsgevarunum umvegis teldupost. Tilboðið er ikki endaligt fyrr enn báðir partar hava skrivað undir sáttmálan.

## Fyrivarni og alment innlit



Tann, ið letur inn tilboð, eigur at hugsa um fyrivarni í mun til útboðstilfarið. Eitthvørt fyrivarni viðførir at Sjúkrahúsverkið kann vísa burtur innlatið tilboð.

Sjúkrahúsverkið tilskilar sær rætt til ikki at taka av nøkrum av innkomnu tilboðunum. Eisini tilskilar Sjúkrahúsverkið sær rætt til at havna einum tilboði, um vøran, ið verður bjóðað framm, er uttan fyri rímiligt mark, tá talan er um góðsku.

Fæst ikki ein sáttmáli við ein veitara, tilskilar Sjúkrahúsverkið sær rættin til at býta vørubólkarnar upp í fleiri partar, og samráðast víðari við einstakar tilboðsgevarar við støði í innkomnu tilboðunum.

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo